# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
eirikur@sosialurin.fo



# SPARING SJOKKERAR TINGFÓLK

- Eg havi ongantíð upplivað so ógvusligar sparingar!

Tað segði Mary í Garði, stjóri í Nærverkinum við Rás2 mánadagin, nú uppsagnir, styttri arbeiðsdagar og færri tænastur merkja Heimatænastuna. Landsstýrið hevur álagt Heimatænastuni av spara 1.3 milliónir krónur.

Sparingin merkir, at fleiri tímalønt missa tímar, at kvøldvaktirnar verða styttar við einum tíma, og at ússalig fólk ikki longur fáa vitjan av heimahjálp um náttina. Eitt nú í Suðurstreymoy eru tað 22 fólk, ið vanliga fáa vitjan av heimahjálpum upp til tríggjar ferðir um náttina.

Soleiðis er støðan í dag. Fólkaheimið Føroyar hevur ikki ráð til hesa tænastu.

Á tingfundi í dag - eftir at blaðið varð farið til prentingar, skuldu tingfólk viðgera eitt eykafiggjarlógaruppskot, har til dømis Rúsdrekkasølan skal hava eina eykajáttan upp á 500 túsund krónur. Vinnumálaráðið ætlar at økja játtanina til Rúsdrekkasøluna, so hon kann liva upp til avlopskravið, sum landsstýrið setir stovninum. Men har mangla 1.6 milliónir í til tess at náa kravda avlopinum. Ein part fær Rúsdrekkasølan innaftur við at gera sølufremjandi tiltøk, sum til dømis at lata ein ekslusivan rúsdrekkahandil upp í SMS og við at seta á stovn ein rúsdrekkahandil í Sundalagnum.

Á henda hátt væntar Rúsdrekkasølan - og landsstýrið - at fólk at keypa meira brennivín, men tó ikki meira enn so, at játtanin til Rúsdrekkasøluna skal økjast við hálvari millión.

At fleiri handlar verða stovnaðir kring landið hóvar kanska fleiri - eins og fleiri fólk eisini eru ímóti hesum. Men líka mikið, hvørja áskoðan vit hava á rúsdrekkasølu, so er tað ótrúliga ørkymlandi, at landsstýrið setir eitt órealistiskt krav til avlop, fyri síðani at geva stovninum eykajáttan og eggja stovninum til at selja meira, samstundis sum almenni politikkurin er, at fólk skulu drekka minni. Hvar er tað yvirskipaða politiska stevnumiðið?




Hans Pauli Strøm boðaði í gjár á Rás2 og á Portalinum frá, at pínumarkið nú varð nátt í sambandi við sparingarnar á almannaøkinum.

Tað er gott og alla æru vert, at onkur talar at í samgonguni, men fyri brúkaran av hesum samfelagnum - fyri veljaran - er tað sera ørkymlandi, at slík boð altíð kom sum sjokk fyri samgongufelagar, onkur í samgonguni má hava yvirskipaðu ábyrgdina. Vit hava ein løgmann - og floksformenninir í hinum báðum samgongufloкkunum sita í landsstýrinum. Men tað tykist ikki, sum serligt samband er millum tingfólk og landsstýrisfólk, og tað er ikki serliga álitisvekjandi.

**» Meðan gomul missa hjálp verður rúsdrekkasøla stimbrað**

# Eyðun av Reyni í Focus



Fríggjadagin 22. oktober klokkan 16 letur ein framsýning við verkum hjá Eyðun av Reyni upp í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn.

Málningarnir hjá Eyðun av Reyni eru sjálvstøðugir og sterkir. Hann er trúgvur mótvegis myndevninum og tí landslagi í tykist at vera ein ótømandi kelda fyri hann. Vanliga ber til at finna eina havsbrúgv aftan fyri litløgini í hansara verkum, og tann havsbrúgvin virkar sum eitt grundarlag í flatanum og gevur myndini eina ávísa dýpd. Havið hevur mong andlit, og tað sæst í myndunum hjá Eyðun av Reyni.

Framsýningin verður open til 4. november, týsdag til fríggjadag kl. 15 til 18 og leygardag kl. 16 til 18.

# At loypa framav

Tá vit á hesum stað mánadagin skrivaðu, at »*Ofta etur hundur tað hann havnar*«, var hetta eitt prik til Hans Paula Strøm og Javnaðarflokkin.

Tað er fallið tingmanninum fyri bróstið. Og tað harmar okkum, at hetta særir tingmannin, men vit kunnu vissa hann um, at tað liggur einki niðrandi í hesum góða gamla føroyska orðataki.

»*Ofta etur hundur tað, ið hann havnar - og ketta tað, hon spýr*« merkir bara tað, at tú »*ofta mást taka søgd orð í teg aftur*«.

Soleiðis er tað mangan - serliga í politikki. Ofta verða orð søgd, sum seinni kunnu vendast í móti tær sjálvum aftur. Tann, ið ofta loypur framav er serliga útsettur í so máta.

Tilsipingin var til sera hørðu ákoyringarnar frá serliga Hans Paula Strøm í summar móti Rósu Samuelsen.

Men ókey, tað hevur kanska hjálpt at langa nevan í borðið, men veruleikin er so tann, at talið á búplássum á Tvøroyri minkar. Tað skuldi tað ikki sambært tingmanninum. Og borgarstjórin í Vági segði, at um avtalan um ellisheimið í Vági ikki varð hildin - uttan at tað gekk út yvir talið á búplássum í oynni annars, so umhugsaði hon sína støðu í Javnaðarflokkinum.



**» A b ... (C) ... nei, D ...**

SONNE SMITH
KJAK Á SÍÐU 36



**» Aftursvar um sparingar**

HANS PAULI STRØM
KJAK Á SÍÐU 35

# Aftur at fiska hemara



Nú verður aftur tíð at fara á flot við tí stóru tráðuni.

- Shark Atlantic kappingin er ein Big Game fiskikapping har vit bert fiska eftir hemara. Og tað er sjálvsagt bert loyvi at fiska við tráðu, Magni Blástein, sum eins og undanfarnu árini er fyrireikari.

Kappingin byrjar 1. november 2010, og síðsti fiskidagur er 1. mars 2011. Í ár er tað Bátatænastan og Jógvan Weihe, sum lata virðislønirnar.

Vinnarin av kappingini í fjør gjørdist Heini Weihe við einum hemara á 150 kg. Nummar tvey og var var Jóannes Gaard við tveimum hemarum á 62 kg og 48 kg.

Hemararnir, sum hava vunnið kappingina síðan hon byrjaði í 2004, hava ligið millum 150 og 223,5 kg. Steypið sum váttar hesa vinnarasøgu er latið av Føroya Banka í 2004.

- Havast skal í huga, at heimsmetið er 230 kg, og søgur siga frá útróðrarmonnum, sum hava fingið størri hemara enn tað. Shark Atlantic er fyri øll, ið hava hug og dirvi - føroyingar sum útlendingar. Sí meira á www.hemari.dk

Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*